DM DEKKMASTER

Fyri settið 9.990,-



**Razor Black 18”**
Við dekkum
5x100 og 5x112 á goymslu

Fyri settið 6.880,-



**5-Star 17”**
Við dekkum
5x114 á goymslu

Fyri settið 12.900,-



**Boston 19”**
Við dekkum
5x112 á goymslu

www.dekkmaster.fo
info@dekkmaster.fo
telefon 227 000



**Keypssamtøkan í Hoyvík**

FK í Hoyvík sóknast eftir

# *Slaktara*

**at byrja 1. oktober 2007**
**ella eftir nærri avtalu**

Slaktarin skal taka lut í tí dagliga arbeiðinum í slaktaradeildini

Slaktaradeildin letur vørur til allar deildirnar hjá FK kring landið

Nærri fæst at vita við at ringja til Lars Hansen slaktarameistara á tel. 314149 ella 272875

**Løn:** sambært sáttmála

Skrivlig umsókn skal, í seinasta lagi 27. august 2007, sendast til

**FK Hoyvík**
**tils. Lars Hansen**
**Postboks 349**
**FO-188 hoyvík**

fk



veitst tú ikki tað?

Sosialurin



# Handilsleiðarar til inn

**í Norðskála og til nýggjan inn handil í Tórshavn**

## Tað kann vera júst tær ið vit leita eftir

Leiðarastarvið í einum stórum matvøruhandli, inniber allar tær avbjóðingar og upplivingar ið nú einaferð eru at finna í einum starvi har so at siga allar hugsandi og óhugsandi støður mynda gerandisdagin. Tað krevst av tær at tú hevur førleikan, ert málsøkin og hartil hevur viljan at røkka dagliga setningin.

Vit bjóða eitt vællønt starv við lyklaorðum sum ábyrgd, úrslit og góðari tænastu til okkara viðskiftafólk. Handilsleiðarin er partur av leiðslutoyminum í inn samtakinum.

Kundi tú hugsa tær at hoyrt nærri um starvið, so ring til Jaspur Johannesen tlf. 235200, ella send tína umsókn við prógvum/ummælum til: inn Landavegur 103 FO-100 Tórshavn.

Allir fyrispurningar/umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði



**inn er eitt samtak við trimum stórum matvøruhandlum. Fyrsti handilin lat upp í Norðskála í 2003, næsti lat upp í Klaksvík í 2006 og tann triðji lat upp í Tórshavn somuleiðis í 2006. Fjórði inn handilin letur upp í Tórshavn seinni í hesum árinum. Umframt matvøruhandlarnar inn hevur samtaki eisini onnur áhugamál.**

inn

**Landavegur 103 · FO-100 Tórshavn · tel 31 37 31**


MARKNAÐARRÁK VIKA 33 2007

**FØROYA BANKI GOTT ÚRSLIT**
Óttin fyri at kreppan á sub-prime lánimarknaðinum stingur djúpri enn væntað, fekk partabrøv at lækka heilt niður ímóti langtíðarrákinum frá 2003. Kreppan førdi við sær, at tjóðbankarnir í Amerika og Evropa komu við eyka kapitali, fyri at tryggja bankunum gjaldføri. Hetta sissaði marknaðirnar og gav partabrøvunum nakað av luft aftur mánadagin.
Mánadagin kom Føroya Banki út við einum hálvársúrsliti áðrenn skatt á 101 mill. kr. samanborið við 46 mill. kr sama tíðarskeið 2006. Vøksturin í inntøkunum stavar m.a. frá hækkandi rentumuni, kursreguleringum og inntøkuførdum niðurskrivingum. Bankin hækkar eisini væntaninar fyri ársúrslitið áðrenn skatt við 10 mill kr. til 145-165 mill. kr. Kursurin flutti seg ikki nógv eftir tíðindini. Hetta kann lesast sum at úrslitið gjørdist áleið sum marknaðurin hevði væntað.

**VÁÐASTIKNIÐ HÆKKAÐ**
Øktu sveiggini og stóra lækkingin í partabrøvum hava økt um váðastiknið hjá íleggjarum. Hesir hava tí flutt størri partar av íløgunum í tryggari pappír sum td. statslánsbrøv og gull, sum samsveiggja øvugt av partabrøvum.

**RENTURNAR KUNNU LÆKKA**
Gjaldførisískoytið frá tjóðbankunum gevur vónir um, at Fed fer at lækka rentuna í septembur. At tað eisini er ivasamt um ECB fer at hækka rentuna ger, at eisini lánsbrævarentur kunnu lækka komandi tíðina. Fíggjarófriðurin hevur eisini elvt til gitingar um, at bankarnir kunnu fara at tátta í gjaldførið hjá vinnulívinum. Hetta stuðlar hinvegin rentuna.

**ÓVISSAN HELDUR FRAM**
Enn er ov tíðliga at siga um lækkingin er av á hesum sinni. Til tess skulu partabrøv hækkað góð 4% aftrat. Men um partabrævavísitølini hinvegin lækka niður um langtíðarrákið, kunnu kursirnir lækka enn meiri. Komandi tíðina verða marknaðirnir viðbreknir og óstøðugir. Hinvegin eru tey grundleggjandi búskaparviðurskiftini góð og tí fara partabrøv sannlíkt at hækka aftur. Lágu partabrævakursirnir kunnu gerast eitt gott keypshøvi. Tó mæla vit íleggjarum at bíða til marknaðurin er vorðin støðugari.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1402,08 | + 0,2% |
| Alheims partabrøv | 8412,75 | + 0,25% |
| Atlantic Petroleum | 1084,00 | -3,04% |
| Føroya Banki | 248,50 | -0,20% |
| Eik Banki | 707,00 | -0,14% |
| KB Trygg Eurostoxx | 108,98 | + 0,55% |
| USD | 546,74 | + 1,32% |
| JPY | 4,62 | + 1,87% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK